# Eyðmerkingar-blað

Bygd/bý: ________

Hvar: ________

Navn: ________

Hvat finni eg?

| | Mynd | Vitan | |
|---|---|---|---|
| Gjar<br>*(Balanus)* |  | Gjar er eitt krabbadýr og festir seg á steinar o.a., tá tað er larva. | |
| Lúsakrabbi<br>*(Hyas)* |  | Lúsakrabbi hevur fingið navnið, tí hann líkist eini lús. Lúsakrabbin livir í størri dýpi enn vanligi fjørukrabbin. Hann er sera átufrekur. | |
| Fliða<br>*(Patella vulgata)* |  | Fliða er ein snigil. Fliðan sýgur seg fasta á hellu ella steinar, soleiðis at hon ikki tornar. Fliðan livir av algum. | |
| Streymgágga<br>*(Neptunea antiqua)* |  | Streymgágga er ein sjósnigil, ið livir mest í djúpum streymasjógvi. Tað kemur meira enn so fyri, at hon skolar upp á land, tá hon doyr. | |
| Purpurkúvingur<br>*(Nucella lapillus)* |  | Purpurkúvingur er eitt satt rovdjór. Hann drepur bæði gjar og krækling. Hann borar hol ígjøgnum skelina á kræklinginum/gjarinum og etur tann vegin. | |
| Fjørukúvingur<br>*(Littorina)* |  | Fjørukúvingur livir oftast ovarlaga í fjøruni. Hann hevur rívitungu við smáum tonnum, sum hann brúkar tá hann rívur føðina í seg. | |
| Toppkúvingur<br>*(Gibbula cineraria)* |  | Toppkúvingur heldur til á sandbotni ella tara á grunnum sjógvi. Toppkúvingur er breiðvaksin, men smalkar í ein topp. | |

# Eyðmerkingar-blað

Bygd/bý: ____________

Hvar: ____________

Navn: ____________

Hvat finni eg?

| | Mynd | Vitan | |
|---|---|---|---|
| Marfluga<br>*(Gammarus)* |  | Marflugur liva bæði í sjógvi, blandingsvatni og í vøtnum. Marfluga etur nærum alt, sum fyri er, eisini deyðan fisk. | |
| Trøllanegl<br>*(Acmaea virginea)* |  | Trøllanegl sær út sum ein hálvur kræklingur, sum hevur ongar rukkur. | |
| Taralús<br>*(Isopoda)* |  | Taralýs liva í tarabløðum. Taralús minnir eitt sindur um marflugu, men hon er fløt. Taralús er ikki krasin og etur nærum alt. Hon hevur ymsan lit, alt eftir, hvussu tarin hon situr á sær út. | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |
| | | | |